Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Steig Nielsen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Stýrisskipanarlógin

Spurningar:

1. Metir løgmaður, at ásetingin í Stýrisskipanarlógini § 54, stk. 2 er fylgd í málinum um at taka Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum?

Viðmerkingar:
Løgmaður boðaði herfyri frá, at hann fór at boða danska forsætismálaráðharranum frá hansara ætlanum um at taka Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum og at gera ein nýggjan felagsskap við trimum sjálvstøðugum londum. Síðani hevur forkvinnan í Tjóðveldi verið úti og boðað frá, at nú fáa vit fullveldi.

Okkara stýrisskipan ásetir greitt, at í samband við broytingar í viðurskiftunum við Danmark, skal landsstýrið ráðføra seg við Løgtingsins uttanlandsnevnd. Tað hevur sum kunnugt ikki verið nøkur ráðførsla við Uttanlandsnevndina í hesum málinum, sum sambært útmeldingunum snúgva seg um at taka Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum.

Tað verður ásett í Stýrisskipanarlógini § 54, stk. 2, at landsstýrið skal “ráðføra seg” við uttanlandsnevnd Løgtingsins í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

Tingsskipanin ásetir í § 24, stk. 1, nr. 2, at ein uttanlandsnevnd við 7 limum og 7 varalimum verður vald at røkja sítt starv sbrt. § 54 í Stýrisskipanarlógini og gevur Løgtinginum tilmæli í øllum uttanlands-, marknaðar- og verjumálum, eisini um viðurskiftini við Danmark.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Bárður á Steig Nielsen